# Tað føroyska heilsuverkið í fríum falli móti forfalli

EIVIND WARBERG
Lækni á LSH



*”En læge, der bliver opmærksom på forhold, som lægen opfatter som sundhedsfagligt uforsvarlige, bør tilkendegive sin mening herom ved deltagelse i den offentlige debat.”*

Den Almindelige Danske Lægeforenings etiske regler §15 (Hesum eru allir føroyskir læknar eisini undirlagdir!)

*”Enhver har ret til ytringsfrihed. Denne ret omfatter meningsfrihed og frihed til at give el. modtage meddelelser el. tanker, uden indblanding fra offentlig myndighed og uden hensyn til grænser.”*

Menneskerettighedsdomstolen Artikel 10, stk.*1*

Tískil hesi orð!

Árið 2004 bar boð um, at nú skuldu nýggir tónar koma viðvíkjandi tí gamla og niðurslitna Landssjúkrahúsinum, men áðrenn nýggi bygningurin var klárur at taka í brúk, kom undan kavi, at als eingir pengar vóru avsettir til tól og tilíkt.

Her byrjar komedian!

Hetta projektið var bert enn eitt dømi um, hvussu tað tykist vera vanligt í Føroyum at loysa trupulleikar; nevniliga við lappaloysnum. Ein nýggjur bygningur – ja, og tað er ein frálíkur bygningur, men hvat við restini? Gamli bygningurin stendur framvegis og har búleikast øll medisinsk deild umframt barnadeildin og oyrna/næsa/háls deildin, í sama uml. 40-50 ára gamla bygningi. Tað einasta sum er hent og hendir eru lappaloysnir og smærri umbyggingar nú og tá. Fyri ikki at tala um E3, svarti barakkbygningurin, har apopleksisjúklingar og eygnadeilin nú húsast. Hesin var av fyrstan tíð ætlaður sum eina fyribilsloysn – hetta væl at merkja fyri uml. 40 árum síðani!!!

2005 var árið tá Føroya fólk á fremsta rað fekk eitt innlit í føroyska heilsuverkið har leikpallurin var Landssjúkrahúsið. Tað var í 2005, at nógv rumbul var á Landssjúkrahúsinum eins og úti í samfelagnum. Tað byrjaði við nøkrum umleggingum á føðideildini.

Orsøkirnar vóru nakrar bygnaðarbroytingar, ið vóru framdar uttan at ráðføra seg við serlæknar innan hesi øki. Í kjalavørrinum av hesum fóru tveir starvsbólkar upp at táttast alment – hótt var bæði við verkfalli og øðrum. Hetta loypti sjálvandi kvøkk og angist millum samfelagsborgarnar.

Annar partur í skemtileikinum var nýggja kommunulæknavaktskipanin. Hendan skuldi tryggja borgaranum eina betri tænastu og var blivin samtykt við einum meiriluta millum allar kommunulæknarnar í Føroyum var klár at seta í gildi. Men so hendi tað, at málið endaði í løgtinginum og har sita trígggir politikarar, ið eisini eru læknar. Teimum eydnaðist at steðga hesum ætlanum við teirri grundgeving, at teir fóru at missa ov stóran part av inntøku síni um tann nýggja vaktarskipanin var sett í gildið. Har liggur málið enn. Einki er hent síðani!

Á Landssjúkrahúsinum standa nýggj høli klár til at húsa kommunulæknavaktum. Við hesa skipan høvdu sjúklingar eisini fingið nógv betri tænastur. Sannleikin er, at kommunulæknar serliga á bygd er overvaðir við núverandi vaktarskipan. Harafturat hevur tað komandi ættarliðið av kommunulæknum í Føroyum eisini fleiri ferðir gjørt vart við, at tey als ikki eru áhugaði í at arbeiða undir núverandi vaktarskipan.

Leikpallurin skifti aftur og høvuðsleiklutin í hesum parti hevði leiðandi yvirlækni á skurðdeildini. Í samband við, at verkfall var í samfelagnum fingu starvsfólk á Landssjúkrahúsinum umvegis útvarpið greið boð um, at ongar skurðviðgerðir skuldu gerast uttan bráfengisviðgerðir. Yvirlæknin kom í stórar trupulleikar, tí hann ikki hevði akta boðum. Var koyrdur til hús, uppsagdur og almenningurin fekk innlit í hvør hevði sagt hvat nær, hvar, hví og hvussu. Spurningurin er, hvat veruliga orsøkin var til hesa avgerð, men eitt er vist, og tað er, at pengar vóru spardir!

Í leikinum var eisini eitt gastronomiskt innslag. Hetta var uppskotið um at Landssjúkrahúsið skuldi fara undir at gera matpakkar til føroysku fólkaskúlarnar, og gekk tað ikki long tíð fyrr enn eitt annað sjúkrahús í landinum kom fram og segði, at tey kundu gera fult so góðar matpakkar og tískil eisini vildu bjóða seg til at gera sunnar matpakkar til næmingarnar í føroysku fólkaskúlunum. Spurningurin er hvat endamálið við einum sjúkrahúsi er? Og um tað í hesum føri ikki var mist fullkomiliga úr eygsjón?

Síðan kom løtan og parturin har ljóð og blá ljós vórðu sett í hásæti. Málið snúði seg um sjúkraflutningin í hesum landi. Hetta gav eisini høvið til, at tvey av teimum trimum sjúkrahúsunum í landinum fóru at kjakast alment um hvør kundi vera skjótari á einum skaðastaði. Alt hetta ístaðin fyri at koncentrera seg um og royna at samstarva. Við tí nú skjótt lidna Norðoyartunlinum er tað altumráðandi, at pláss verður fyri einum sømiligum og seriøsum kjakið har evt. lokalpolitisk áhugamál verða sett til viks og har tann einkulti borgarin verður kunnaður á ein reellan hátt. Veruleikin er jú, at alla aðrastaðni í heiminum so er gongdin innan sjúkrahúsverk tann, at viðgerðir verða miðsavnaðar. Ein møguleiki kundi verið, at sjúkrahúsini bæði høvdu hvør síni økið, sum tey vóru serkøn í.

Eftir stuttan steðg vórðu leiktjøldini aftur drigin frá til enn ein part í sjónleikinum “Heilsuverk Føroya anno 2005”. Í hesum parti var avgjørt at seta 2-3 búskaparfrøðingar afturat, tí nú skuldi skil koma á fíggjarstýringina á Landssjúkrahúsinum. Her var uppskotið av fyrstan tíð at raðfesta 2-3 ársverk uppá íalt 1,2 – 1,5 mio. um somu tíð sum noktað var at geva eykajáttan til barnadeildina og tvær medisinskar deildir. Ein avgerð, ið tíbetur bleiv kolldømd, men sum kundi havt tær avleiðingarnar, at sjúk børn saman við teirra foreldrum skuldu ligið lið um lið við vaksin álvarsliga sjúkum fólkum á einari bráðfeingisdeild hvørt vikuskifti. Og at álvarsliga sjúk og doyggjandi fólk skuldu skiftast um at flytast ímillum tvær medisinskar deildir í vikuskiftum, tvs. nýtt umhvørvi og nýggj starvsfólk. Ein óvirðiligur endi á lívinum!

Avgerðin um at seta 2-3 búskaparfrøðingar afturat verður tó allarhelst framd, hetta ístaðin fyri at raðfesta pengarnar til tey, ið heilsuverkið í veruleikanum er til nevniliga sjúklingarnar og viðgerðina av teimum.

Um politikarar og skattaborgarar halda, at eitt økt tal av embætsfólkið spegla eina samsvarandi øking av arbeiðsmongdini fara teir skeivir, tí tað tørvar als ikki at vera nakar samanhangur millum tað arbeiði, ið skal gerast og mongdina av teimum, ið skulu gera tað. Parkinsons lóg greiðir frá vøkstrinum í embætismannaverkinum. Hetta byggir uppá tvey ting: 1) ein embætsmaður ynskir at økja um talið av undirmonnum, men ikki av kappingarneytum og 2) embætsfólk skapa arbeiði fyri hvønn annan. Niðurstøðan er, at administratión og administratorar altíð vilja hava lyndi at økjast. Vandi er fyri, at júst hetta er við at henda í føroyska heilsuverkinum.

Um somu tíð mangla nógvir serlæknar í Føroyum. Hetta hevur við sær, at sjúklingar viðhvørt mugu av landinum og teir serlæknar sum eru mugu renna tað skjótari. Nógvir føroyskir serlæknar eru uttanlanda og tað eru ikki bert familjuviðurskifti osfr., sum gera at tey ikki koma henda vegin! Tað er als ikki vist, at komandi ættarlið av føroyskum læknum fara at koma til Føroya fyri einhvønn prís!

Eitt, sum verður gloymt í øllum hesum er, at líkamikið um ein tosar um flakavirki, sjúkrahús ella eitt annað virki, so er tað í “framleiðsluhøllini”, at kjarnuveitingin er. Rundanum hesa framleiðslu er so ein leiðsla, men øll á virkinum eru vitandi um, at kjarnuveitingin er at finna í framleiðsluhøllini, og tað er henda, sum øll á virkinum liva av. Á einum sjúkrahúsi er kjarnuveitingin tað beinleiðis sambandið millum heilsustarvsfólkið og sjúklingin, tvs. td. sjúkrasystrina og sjúklingin ella læknan og sjúklingin.

Eitt annað, ið eisini tykist vera gloymt í øllum kjakinum um afturvendandi sparingum innan heilsuverkið er hugtakið loyalitetur. Har ein leiðsla hevur loyalitetin fyri hægri mynduleika og tølum, so hevur ein lækni umframt henda loyalitet eisini ein annan loyalitet, nevniliga fyri tí einstaka sjúklinginum – ein loyalitetur, sum einhvør lækni hvar sum helst í heiminum hevur avlagt eitt lyfti um, at hann/hon vil halda fyri einhvønn prís, og sum ein lækni kann verða dømdur fyri, um hann/hon ikki heldur. Tað vil tískil altíð vera vandi fyri einum diskrepansi ella einum dilemma ímillum hvar loyaliteturin skal vera. Fyri tølum ella fyri sjúklinginum? Tað skal eingin ivi vera um, at loyaliteturin fyrst og fremst er fyri sjúklinginum!

Afturvendandi vandin, er at ein leiðsla verður ov stór og fremmandagjørd í mun til kjarnuveitingina. Meira og meira tíð verður brúkt til fundir osfr. Ein skal ikki halda, at vaksandi bureaukratisering ger viðurskifti meira smidlig og effektiv, soleiðis at ein fær meir fyri pengarnar. Tað er vælkent, at bureaukrati alir fram meira bureaukrati. Á henda hátt fara eisini fleiri og fleiri pengar til at administrera og færri og færri pengar vera eftir til kjarnuveitingina.

Tað gevur als onga meining at tosa um visión 2015, heilsuætlanir, universitetssjúkrahús, granskingarpark, gransking innan læknavísind osfr. uttan at tilluta neyðugu ressoursirnar, gera neyðugu tiltøk og uttan at arbeiða fyri einum akademiskum umhvørvi.

Í hesum døgum verður nýggja høvuðsinngongdin á Landssjúkrahúsinum innvígd. Arkitektar og listarfólk hava arbeitt dúgliga fyri at seta krúnuna á verkið. Almenn móttøka verður og list skal avdúkast. Eftir er so bert at spyrja, um tað verður sum tá drotningavitjan var í húsinum seinasta summar. Tá vóru sjúklingar kveistraðir til viks fyri at geva pláss fyri reyða løbaranum soleiðis, at sjampanjupropparnir kundu skjótast av í frið og náðum. Og øll vóru á einum máli um, at nú var alt frálíkt og nú fór at vera betur. Alt hetta minnir ikki sørt um eitt kent ævintýr um ein keisara, ið gekk nakin gjøgnum býin í meðan øll í býnum klappaðu, og hildu at tað vóru avbera vøkur klæði hann júst hevði fingið seymað. Tað er eitt orðatak, ið sigur at: “ Ikki er alt gull, ið glitrar.”

Her endar í hesum umfari tragikomedian um føroyska heilsuverkið. Um árið 2005 má sigast, at har fekk Føroya fólk gaman og álvara fyri hvørja sparda krónu.

Við komandi spariætlanum átti ríkiligt av pengum at verið til enn ein skemtileik í 2006!

Tað skal eingin ivi vera um, at um so er at einki ítøkiligt verður gjørt, so søkkur føroyska heilsuverkið spakuliga longur afturúr og tá verður trupult at koma upp aftur á eitt støði, sum føroyska samfelagið hevur krav uppá og kann liva við. Tað føroyska heilsuverkið er sjúkt, og sum nú er við afturvendandi sparingum fær sjúklingurin, í hesum føri tað føroyska heilsuverkið, ikki ta neyðugu hjálpina fyri at yvirliva.

Tað er einki sum bendir á, at eitt heilsuverk hvar sum helst í heiminum verður bíligari at reka í framtíðini. Tað eru fleiri grundir til hetta. Fyri tað fyrsta so livir menniskjan sum heild longur ídag. Tvs. at fólk oftari koma í samband við heilsuverkið so ella so. Hetta kann mann royna at gera nakað við. td. við á ymsan hátt at fyribyrgja. Men hetta kostar allaroftast eisini pengar og er sjáldan ókeypis.

Tað eru tó hóast hetta ikki allar sjúkur, ið kunnu fyribyrgjast og líkamikið hvussu gamal ein verður, so fer ein altíð fyrr ella seinni at hava brúk fyri heilsuverkið. Tað vil sostatt altíð vera brúk fyri viðgerð og røkt av sjúkum fólkum.

Harafturat, so mennist læknavísindin allatíðina og hetta merkir, at fleiri og betri viðgerðarmøguleikar støðugt koma fram. Fólk, ið arbeiða innan eitt heilsuverk ynskja tískil sjálvandi at kunna bjóða teir betru viðgerðarmøguleikarnar til sjúklingarnar. Hesir eru tó oftast dýrari enn teir gomlu – nýggjari heilivág, nýggj tól osfr.

Tilsamans ger hetta, at fólk vænta og krevja meir. Sjúkur, sum fyrr ikki kundu viðgerast kunnu ídag viðgerast og tískil góðtaka fólk ikki á sama hátt at liva við sjúkum ídag sum fyrr.

Tað er eisini sannlíkt, at komandi ættarlið fara at hava fleiri vónir og krevja meir.

Við øðrum orðum, so verður føroyska heilsuverkið neyvan bíligari í framtíðini, men tværturímóti dýrari at reka um mann ynskir at halda sama støði ella betra tað – mann fer ikki at fáa meir fyri minni! Sum nú er, tykist frymilin/devisan vera, at allarbest hevði verið, um eingir sjúklingar vóru á sjúkrahúsinum! So hevði verið møguligt at spart nógvar pengar. Hetta er uttan iva rætt, men sannleikin er tó, at hetta tíverri als ikki er í trá við veruleikan.

Tað skal tí hervið vera ein áheitan til landsins politikarar um at gera upp við seg sjálvan, hvat tað er fyri eitt heilsuverk, ein ynskir í Føroyum í framtíðini. Ynskir mann eitt heilsuverk á einum miðal el. undirmiðal støði, so er tað ein raðfesting, sum landsins myndugleikar avgera, men so er eisini at melda klárt út, at tað er hetta, ið mann ynskir og ikki villleiða samfelagið við, at ein ynskir nakað annað. Verður harafturímóti melda út frá myndugleikanna síðu, at vit ynskja eitt heilsuverk, sum er fult á hædd við heilsuverk, ið vit plaga at sammeta okkum við aðrastani, so er tað altavgerandi, at landsins politikarir vakna og gera tær neyðugu raðfestingarnar og tilluta tær neyðugu ressursirnar fyri at hetta yvirhøvur skal kunna gerast veruleiki – um hetta skal vera í 2015 ella ei er ikki tað mest umráðandi.

Tíðin er búgvin til, at føroysku politikarnir, ið stýra hesum landið og hava ábyrgdina seta evt. persónlig og/ella lokalpolitisk áhugamál til viks og hugsa meira framskygt.

Um so er, at politikarnir ikki megna hesa uppgávu, so kundi tað hugsast, at onkur td. ein framstandandi føroyskur vinnulívsmaður sum í farnu viku legði fram eitt stórstílað projekt í Hoyvíkshaganum eisini hevði havt áhugað í at lati bygt eitt privatsjúkrahús. Sum rákið er í samfelagnum ídag har fleiri og fleiri virkir verða einskild, so kundi hetta møguliga eisini verið eitt alternativ, um mann frá myndugleikanna síðu metir, at Landssjúkrahúsið er ov dýrt og viljin til at geva neyðugu ressursirnar ikki er til staðar.

Viðmerkjast skal, at omanfyristandandi orð eru persónligar meiningar hjá undirritaða og tískil ikki kunnu tilskrivast øðrum starvsfólkum á Landssjúkrahúsinum.